# Broytingar í Ársins songrødd



*Jákup Jacobsen og Ragnhild Ellingsgaard frá Ársins Songrødd og Samson Nesá frá Mentunarhúsinum í miðjuni. Bæði finalan og undanumfarið fyri Eysturoynna verða í Mentunarhúsinum.*

**Mentanarhúsið í Fuglafirði fer at hýsa einum undanumfari og finaluni í Ársins Songrødd. Um vikuskiftið verður kappast í Miðvági**

SONGRØDD
*Heri á Rógvi*

Í kappingini at finna ársins bestu songrødd eru nakrar broytingar gjørdar. Tað fyrsta umfarið hevur verið í Havn, men nú verður umskipað eitt sindur fyri nøkur av teimum komandi umførunum.

Tað er nú avgjørt, at finalan »Ársins Songrødd 2003« verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði tann 24.mai.

Ætlanin var, at finalan skuldi verið ikki so langt burturi – nevniliga í høllini á Kambsdali. Fyrireikararnir og Mentanarhúsið hava eisini gjørt avtalu um, at innleiðandi umfar fyri eysturoynna eisini skal vera í Mentanarhúsinum, og hetta umfarið verður tann 3.mai. Sum áður nevnt, so verður finalan hildin tann 24.mai sama stað.

Mark Joensen, fyrireikari, sigur, at teir hava tikið hetta stigið fyri at fáa góðskuna so góða sum gjørligt.

– Mentanarhúsið í Fuglafirði er eitt frálíkt stað, og vit vilja hava so góðar karmar sum gjørligt, sigur Mark Joensen.

Ikki eins nógv rúmast í Mentanarhúsinum sum í ítróttarhøllini, men hetta má mann so víkja fyri góðskuni, heldur Mark Joensen.

### Býta um

Undanumfarið fyri Vágarnar og umfarið fyri Eysturoynna, sum altso nú verður í mentanarhúsinum í Fuglafirði, hava býtt um pláss. Allir luttakararnir í Vágunum hava longu fingið boðini.

Sostatt verður komandi leygarkvøld tann 12.apríl næsta umfarið í Ársins Songrødd í Bygdarhúsinum í Miðvági. Tiltakið byrjar kl. 23.30 og endar kl. 03.30.

Ársins songrødd 2003 fær, umframt heiðurin, tíggju túsund krónur. Nummar tvey og trý fáa ávíkavíst fimm- og trýtúsund krónur.

Og so skal tað eisini við, at Guðrun Sólja Jacobsen í 2001 tryggjaði sær sigurin í kappingini, um tað kann freista nøkur.

## Undankappingarnar

Fimm undankappingar eru eftir. Stóri áhugin í høvuðsstaðnum ger, at eitt umfar afturat verður í Badmintonhøllini 10. mai. Finalan verður 24. mai. Raðfylgjan er hendan:

| | |
|---|---|
| MIÐVÁGUR, Bygdarhúsið | 12.apríl |
| HVALBA, Roynhøllin *(2. Páskakvøld)* | 21.apríl |
| FUGLAFJØRÐUR, Mentanarhúsið | 3.mai |
| HAVN, Badmintonhøllin *(2. umfar)* | 10.mai |
| KLAKSVÍK, Kí-høllin | 17.mai |

# Ikki uttan stríð

**– Tað skal grundgevast øgiliga væl, um vit skulu steðga við byggingini í Vallalíð. Hetta fer at merkja stórar broytingar í bygginginum – eisini langt aftur í tíðini, sigur Heðin Mortensen**

BYGGING
*Heri á Rógvi*

Málið um byggingina í Vallalíð fær eftir øllum at døma eftirspæl, líkamikið hvør niðurstøðan hjá Løgmálaráðnum verður.

Málið byrjar við, at grannarnir í Vallalíð, har Tórshavnar kommuna byggir eitt heim til minnisveik. Stórt trot er á tílíkum heimum, og grannarnir leggja eina við, at hetta einki hevur við tað, at talan er um minnisveik, at gera.

Spurnartekin verða sett við, um Tórshavnar kommuna hevur heimild at byggja eitt tílíkt heim á økinum, tá økið er eitt A1 økið.

Síðani er málið farið víðari til Oljumálaráðið, ið hevur byggimál um hendi. Har verður greitt sagt, at Tórshavnar kommuna ikki hevur heimild at byggja heimi á einum A1 øki, og byggingin skal steðgast.

Men Tórshavnar kommuna ætlar ikki at steðga byggingini.

Málið er nú hjá kommudeildini í Løgmálaráðnum.

### Áðrenn páskir

Hilmar Høgenni, ið hevur við kommunumál at gera í Løgmálaráðnum, sigur, at teir ætla at hava avgreitt málið áðrenn páskini.

– Taka vit eina endaliga avgerð, so er tað eisini ein endalig fyrisitingarlig avgerð, sigur Hilmar Høgenni.

Tórshavnar kommuna hevur møguleikan at fara í rættin við málinum. Somuleiðis kann Oljumálaráðið fáa eitt fútabann móti byggingini, um so er, at tað verður neyðugt.

Landsstýrismaðurin, og tað er Høgni Hoydal í hesum førinum, kann eisini áseta dagbøtur til býráðslimirnar í Tórshavnar býráð sambært Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri, heldur kommunustýrið seg óvirkið mótvegis lógarásettum skyldum.

### Góðar grundgevingar

Varaborgarstjórin og formaðurin í Byggi- og býarskipanarnevndini hjá Tórshavnar býráði, Heðin Mortensen, sigur, at tað skal grundgevast øgiliga væl, um Tórshavnar kommuna skal gevast við byggingini í Vallalíð.

Hann vil kortini ikki siga, hvørji stig tað kann hugsast, at kommunan tekur, hevur Løgmálaráðið somu støðu sum Oljumálaráðið.

– Tá ein avgerð kemur frá Løgmálaráðnum verður hetta viðgjørt á býráðsfundi, sigur Heðin Mortensen.

Hann ger eisini greitt, at Tórshavnar kommuna ikki góðtekur boðini um at steðga byggingina í Vallalíð.

– Eg haldi, at Oljumálaráðið er í villareiði. Vit hava bygt eftir hesum leisti í fjøruti ár, og tað snýr seg um nógvar byggingar – eisini hjá tí almenna. Vit hava sæð, at tað er ein stórur tørvur á heimum, og hetta royna vit at loysa við hesum, sigur Heðin Mortensen.

Og tann møguleiki, sum í hesum førum eitur dagbøtur, er Heðin Mortensen ikki so bangin fyri, og hann heldur ikki, at málið kemur hartil, hóast tað kanska hevði verið gagnligt at fingið málið roynt í rætti, tí talan nú er um reint jura, heldur hann.

– Eg kenni bara eitt mál í Danmkark, har býráðslimir hava fingið álagt dagbøtur. So tað kann vera, at vit verða teir næstu í ríkinum, sigur Heðin Mortensen.



*Í Vallalíð verður arbeitt enn, og tað skal nógv til, um Tórshavnar kommuna skal steðga við byggingini.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

# Nýggjur 200

Nationalbanken hevur útgivið ein nýggjan danskan 200 krónuseðil. Hesin er rættiliga meinlíkur tí gamla. Sjónleikarin Johanne Luise Heiberg er framvegis myndað á seðlinum, sum hevur eisini hevur eina løvu avmyndaðu.

Tað er av trygdarorsøkum, at hesin seðilin verður útgivin. Øll serian av seðlum verður útskift, og hetta er eisini orsøkin til, at ein nýggjur føroysku hundraðkrónuseðil varð útgivin fyrr í ár. Seinni verða eisini hinir føroysku seðlarnir útskiftir.

Gomlu donsku tveyhundraðkrónuseðlarnir eru framvegis galdandi, men verða inndrignir sohvørt.

*– HR*




*Nýggi danski tveyhundraðkrónuseðilin.*



# Linni at hóma millum Føroyar og Kanada



*- Vit hava roynt at uppfylt tey krøv, ið kanadiumenn hava sett, og í hesum sambandi hava vit ikki loyvt føroyskum rækjuskipum at fiska aftur á Grand Bank, síðan kanadiskir myndugleikar avgjørdu at steingja havnir sínar fyri okkara fiskiskipum, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum.*

**- Samskifti er alla tíðina á embætismannastøði millum føroyskar og kanadiskar myndugleikar um stongsulin í Kanada og føroysku veiðimøguleikarnar har yviri, sigur Jacob Vestergaard**

STONGDAR HAVNIR
*Vilmund Jacobsen*

Í eitt heilt ár hava kanadiskir myndugleikar noktað føroyskum fiskiskipum atgongd til kanadiskar havnir. Hetta hevur ført til, at føroysku rækjuskipini, sum fiska á Flemmish Kap, hvørki kunnu leggja veiðina upp har yviri longur, ei heldur skifta manning. Fær eitt føroyskt rækjuskip maskinskaða á Flemmish Kap, kann tað ikki sleipast til lands í Kanada, men noyðist longu leiðina heim til Føroya. Einastu atgongdina, føroyskir fiskimenn hava í Kanada, er við havarí. Somuleiðis er eydnast fiskimonnum, sum eru vorðnir sjúkur umborð, at sleppa undir læknahond í Kanada. Tað hendi herfyri, tá ið ein av manningini umborð á rækjuskipinum, Høgafossi, gjørdist sjúkur. Tá flutti ein kanadisk bjargingartyrla mannin til lands.

### Missa ein túr

Stongsulin hevur ført við sær, at føroysku rækjuskipini, sum kanska eru komin higar til lands einaferð um árið, nú noyðast heim til Føroya einar 5 ferðir um árið.

- Eg havi skilt, sigur Jacob Vestergaard, fiskimálaráðharri, at føroysku skipini soleiðis missa ein heilan túr um árið.

Orsøkin til stongsulin í Kanada, er sambært kanadiskum myndugleikum, at føroysk rækjuskip ikki hava gingið undir treytirnar fyri veiði í altjóða sjógvi á Grand Bank, sum NAFO setir.

Stríðið hevur staðist av, at NAFO ikki hevur tillutað Føroyum tey veiðirættindi, sum føroysku rækjuskipini sambært søguligum veiðitølum halda seg eiga har yviri.

Føroyska kvotan á Grand Bank røkkur nevniliga bert til nøkur heilt fá tons til hvørt av føroysku rækjuskipunum.

Og tað halda føroyingar vera órættvíst, tá ið vit vóru millum teir fyrstu, ið byrjaðu at fiska rækjur í altjóða sjógvi á Grand Bank.

### Kemur ikki

Í samband við stóru fiskivinnustevnuna, sum verður í Runavík um mánaðarskiftið, apríl/ mai, bjóðaði Jacob Vestergaard fleiri fiskimálaráðharrum – og har ímillum tí kanadiska – til Føroya.

Men kanadiski fiskimálaráðharrin kemur ikki á hesum sinni.

Jacob Vestergaard sigur, at kanadiski fiskimálaráðharrin ynskti at koma til Føroya nakrar dagar fyri fiskivinnustevnuna, nevniliga 24. apríl, men seinni kom so aftur ein fráboðan úr Kanada um, at tað heldur ikki lá fyri hjá honum at koma higar til lands tá.

- Men eitt annað høvi at tosa saman er fyri framman, tí 16.-18. juni verður fundur millum norðuratlantisku fiskimálaráðharrarnar í Halifax í Kanada. Hetta er ein fundur, sum er á hvørjum ári, og hann skiftir millum londini, sigur Jacob Vestergaard.

### Hómar ein linna

Landsstýrismaðurin sigur, at ein linni er at hóma í samband við stongsulin í Kanada, men hann ásannar, at enn eru viðurskiftini millum londini tíverri ikki komin uppá pláss.

- Og hetta er sera óheppið, heldur hann.

Jacob ivast í, hvussu umráðandi tað er hjá okkum føroyingum at halda fast um søguligu rættindini, vit meta okkum at eiga á Grand Bank, tá ið avleiðingin er, at Kanada steingir sínar havnir fyri føroyskum fiskiskipum.

- Spurningurin er, um tað vit fáa tillutað í okkara part, ikki kostar meira, enn hesi rættindi geva okkum.

Jacob ásannar, at tað verður stríggið hjá okkum føroyingum at fáa tey rættindi, vit halda okkum eiga á Grand Bank.

- Og seta vit okkara egnu kvotu á leiðini, er ikki væntandi, at stongsulin fær nakran enda, leggur hann aftrat.

Hann sigur, at tað, sum føroyskir myndugleikar hugsa sær í eini loysn av trætuni, er, at føroysk rækjuskip fáa nøkur rættindi í kanadiskum sjógvi afturfyri, at vit lora í krøvunum um Grand Bank.

- Men eingin endalig avtala verður gjørd um slík viðurskifti uttan í samráð við føroysku rækjuvinnuna.

Jacob sigur tó, at tað eru ávís tekin í vinnuni um, at hetta kanska er ein gongd leið burtur úr trætuni.

### Uppfylla krøvini

- Vit hava roynt at uppfylt tey krøv, ið kanadiumenn hava sett, og í hesum sambandi hava vit ikki loyvt føroyskum rækjuskipum at fiska aftur á Grand Bank, síðan kanadiskir myndugleikar avgjørdu at steingja havnir sínar fyri okkara fiskiskipum. Somuleiðis hava vit uppfylgt krøvini um eygleiðara umborð á rækjuskipunum.

Landsstýrismaðurin sigur, at hesi stig hava verið við til at linna um viðurskiftini, men hann ásannar, at enn er ikki komið undir land.

Jacob Vestergaard skilir tó væl, at rækjuskipini – í teirri støðu, tey eru í – leggja trýst á landsstýrið og vilja sleppa innaftur á Grand Bank at fiska.

- Men viðurskiftini millum føroyskar og kanadiskar myndugleikar mugu loysast, og loysnir finnast bert við semjum, sigur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum.

# Svartkjaftaskipini hava rokfiskiskap við St. Kilda



*Svartkjaftaskipini rokast á leiðunum við St. Kilda.. - Í løtuni er so nógvur svartkjaftur at fáa sum sjáldan – ella ongantíð - áður, sigur Jákup Oluf Joensen á Havsbrún*

**Tað hevur staðið á hjá Havsbrún í Fuglafirði at tikið ímóti øllum svartkjaftinum, sum føroysku skipini fáa**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Skipini, sum royna eftir svartkjafti suðuri við oynna St. Kilda, hava rættiligan rokfiskiskap.

Næstsíðsta túr fekk Tróndur í Gøtu heili 1900 tons í eitt samdøgur!

### Stendur á

Á Havsbrún í Fuglafirði hevur í seinastuni staðið á at tikið ímóti øllum svartkjaftinum, sum føroysku skipini hava fingið, og tí noyddust Tróndur í Gøtu og Høgaberg herfyri til Íslands við veiðini.

Jákup Oluf Joensen á Havsbrún sigur, at svartkjaftafiskiskapurin í seinastuni hevur verið so góður, sum sjáldan – ella ongantíð - áður.

- Fiskurin gongur skjótt norðureftir, og tá ið líður nakað út, verður hann í føroyskum sjógvi, sigur hann.

Fyrr í vikuni landaði Norðborg 2.000 tons í Fuglafirði, og hósdagin landaði Kristian í Grótinum somuleiðis 2.000 tons.

Bæði skipini vóru fullfermd eftir stuttari roynd.

Skipini hava eitt samdøgur til leiðirnar við St. Kilda.

### Krúnborg á veg

Á Havsbrún vænta tey Krúnborg aftrat hesa vikuna. Teir høvdu 2.000 tons í gjáramorgunin og verða væntandi á Fuglafirði í dag.

Jupiter hevur landað í Írlandi í vikuni. Teir vóru eisini fullfermdir, 1500 tons av svartkjafti.

Jákup Oluf Joensen sigur, at tað stóð ikki á hjá Jupiter at sleppa av við hesa lastina í Írlandi.